# Skaldskapur av mannamunni

## Sagnir

### Hvat er ein søgn

**Ein søgn er**

- ein munnliga varðveitt frásøgn um okkurt, sum hendi fólki, ið veruliga vóru til.

- ein søga sum frásøgumenn og áhoyrara halda hava verið til á einumhvørjum tilskilaðum plássi í landinum

### Stílurin í sagnunum

**Stílurin er**

- Sagnir er skaldskapur av mannamunni, og tí hava tær sín serliga stíl, hetta fyri at tær lættliga kunnu minnast.

**Stílurin verður lýstur í seks punktum**

- Tað er sjáldan meira enn ein hending í hvørjari søgn
- Tað er bara ein tráður
- Vanliga eru fáir persónar
- Eingin óvikomandi er við í søgnini
- Samrøður verða sjáldan endurgivnar beinleiðis
- Søgnin kann vera bygd upp um eina málisku ella málburð

### Ymisk sagnasløg

**Persónsøgusagnir/sannsøgusagnir**

- Hetta eru sagnir um fólk, sum hava livað, og um hendingar, teimum hevur verið fyri
- Sannsøgusagnir kunnu skiljast sundur í tveri bólkar
- Eldri sagnir – farnar fram fyri ár 1615
- Yngri sagnir – farnar fram eftir 1615

**Huldusagnir**

- Huldusagnir eru sagnir um hendingar og viðurskifti millum tey kristnu og huldufólkini tey heidnu ella tey fornesku.
- Hetta eru sagnir um yvirnáttúrligar verur sum vættrar, trøll, risar, nykar og onnur

**Upphavssagnir/upprunasagnir**

- Upprunasagnir eru sagnir um uppruna til ymisk fyribrigdi og eyðkendar formar í náttúruni.
- Hetta slag av sagnum er ofta komið fram, tá fólk hava følt trongd til at fáa greiðu á, hvussu oyggjar, heyggjar og støð eru vorðin til, fyri síðan at kunna greiða frá tí.
- Dømi um upphavssagnir: Risin og Kellingin - Gullheyggjar

**Staðarsøgn**

- Staðarsøgn er ein søgn, ið er knýtt at ávísum staði í einari ávísari bygd ella landi, og hon hevur ongan javnlíka
- Dømi um staðarsøgn: Ormur bóndi á Skála – Guttormur í Múla

**Ferðasøgn**

- Ferðasøgn er ein søgn, ið ferðast. Hetta slag av søgnum er ofta í fleiri bygdum og londum.
- Hetta eru sagnir og sagnabrot, ið ofta verða skoytt uppí aðrar sagnir, tá sagt verður frá teimum.
- Dømi um ferðasøgn: Kópakonan - Bembil

**Sagnir verða niðurskrivaðar**

**Fyrstu sagnir á føroyskum eru:**

- J. H. Schrøter og V. U. Hammershaimb lótu prenta í “Antiquarisk Tidende” frá umleið 1850

- “Færøske folkesagn og æventyr”, sum J. Jacobsen gav út frá 1898 til 1901